Miðvís venjing

Hetta heldur Páll Poulsen er størsta orsøkin til, at Neistin leygardagin kundi taka ímóti gullmerkjunum



Jákup Mørk

Páll Poulsen, sum í vetur hevur havt ábyrgdina av neistaliðnum, sigur, at miðvís venjing hevur verið størsta orsøkin til, at Neistin loksins kann kalla seg føroyameistara hjá monnunum.

- Vit hava alla tíðina roynt at betra um avrik okkara, og hvørja ferð vit møtt einum trupulleika, hava vit roynt at funnið út av, hvussu okkurt møguliga kann gerast betri, heldur venjarin fyri.

Eitt nú vísir venjarin á, at teir ofta hava havt trupulleikar, tá hini liðini hava vart offensivt, og í steypafinaluni mistu teir sigurin á gólvið, eftir at Áki og Heini vórðu mansvardir.

- Í landskappingini eru avrikini bara vorðin betri og betri, heldur Páll sjálvur, og sum dømi um hetta vísur hann eisini á, at menn hansara ikki hava tapt landskappingardyst, síðani teir í november mánaði vitjaðu í Vestmanna.

Nú kann venjarin so fegnast saman við leikarum sínum, men sum hann sigur, so liggja nógvir stravnir venjingartímar aftan fyri gullmerkini.


Gleðast

Tá vit spurdu venjaran, hvat næsta málið hjá liðnum skuldi vera, var svarið, at nú sleppa teir ikki longur. Europa-Cup hava teir so ikki tosað um enn, tí sum hann sigur, so hava teir bert hugsað um heimligu kappingina.

- Nú skulu vit bara vera glaðir, vóru seinasta orðini frá venjaranum

Bíði til tað er spennandi

Áki Mørk er ein teirra, sum rættuliga hevur fingið sítt gjøgnumbrot hetta kappingarárið, og eftir dystin hittu vit hann, tá hann saman við liðfeløgunum gleddist um gullmerkini



Jákup Mørk

Eftir at hava ynskt honum tillukku, spurdu vit um, hvørt tað var nøkur serlig orsøk til, at hann fleiri ferð í ár hevur traðkað til, tá stóru skjúttarnir, Heini og Áki, hava verið tiknir úr spælinum av mótstøðuverjunum.


- Eg bíði til tað verður spennandi, svarar hann aftur við einum smíli. - Nei, tað er meira tað, at tað verður meira opið, tá mansverja verður nýtt, og serliga gevur hetta pláss til meg og Finnur. Í steypafinaluni riggaði hetta tó ikki, men síðani tá hava vit vant miðvíst við hesum trupulleika, og tað hevur so eisini givið úrslit, greiðir Áki frá.

22 ár eru nú liðin, síðani Neistin seinast var føroyameistari. Ta ferðina var pápi Áka, Jógvan Martin, á liðnum, og vit spurdu Áka, hvussu tað kendist, nú hann hevði gullmerkini um hálsin.

- Tað er ikki so galið. Áðrenn eg fór út í morgun, segði hann við meg, at nú skuldi eg taka føroyameistaraheitið aftur, og tað eydnaðist so eisini, segði Áki at enda, áðrenn hann setti kósina móti skiftirúminum, har lagið á liðfeløgunum var gott, sum vera man.

Marginalar og málmenn

Ein teirra, sum eftir dystin leygardagin, kundi fegnast saman við bláu áskoðarafjøldini, var fiskasølumaðurin, Rói Egholm, og fingu vit eisini eitt lítið prát við hann



Jákup Mørk

Eg haldi tað var ein góður dystur. Fyrri hálvleikur var ógvuliga javnir, og tað vísti seg eisini, soleiðis sum nógv høvdu spátt, at málverjarnir komu at hava ein stóran leiklut. Soleiðis helt Rói Egholm fyri, tá vit spurdu hann um hansara áskoðan á dystin leygardagin, har hann var ein teirra, sum var staddur í bláu áskoðarafjøldini.

- Íslendingurin stóð ótrúliga væl, og tað gjørdi faktist, at Sámal ongantíð kom inn í dystin. Tá so Ingi eisini varð sera væl vardur, fekk Neistin steðgað einum stórum parti av álopsspælinum hjá VÍF, heldur Rói.

Eisini helt hann, at Neistin hevði teir vælkendu marginalarnir við sær, og sipar m.a. til, at teir megnaðu at halda sambandi við VÍF við líka, hóast teir tað einu løtuna vóru fýra móti sjey.

- Neistin hevði bæði marginalarnar og málverjarnar við sær í dag, og hetta var týdningarmesta orsøkin til sigurin, segði ein fegin Rói Egholm at enda.

Verjan og viljin avgerandi

Hetta heldur liðskiparin á neistaliðnum, Inga Danberg, vóru størstu orsøkirnar til, at neistaliðið megnaði at vinna silvurmerkini

Jákup Mørk

Undan kappingini mundu tað ikki vera mong, sum roknaðu kvinnuliðið hjá Neistanum millum favoritt-arnar til at vinna heiðursmerki av nøkrum slag. Nú seinasti dysturin var leiktur, høvdu tær so kortini vunnið silvur, og eftir dystin leygardagin hittu vit liðskiparan á Neistaliðnum, Ingu Danberg.

Mettar sum fimmarar

- Vit vóru kanska styrkismettar sum nummar fimm áðrenn kappingin byrjaði. Flestu høvdu helst Štjørnuna sum favoritt, meðan Kyndil, VÍF skuldu stríðast um heiðursmerkini, umframt at fleiri eisini roknaðu við, at VB fór at gera um seg.

Vit høvdu ikki fingið nakra serliga tilgongd undan kappingini, og tí vóru tað ikki nógv, sum roknaðu við okkum. Síðani hava vit so fingið Ileanu, sum hevur styrkt um liðið.

Soleiðis heldur Inga, at flestu áskoðararnir roknaðu við, at kappingin fór at laga seg. Spurd um, hvør uppskriftin til óvæntaðu silvurmerkini hevur verið, sigur hon, at tað fyrst og fremst er við útgangsstøði í eini sterkari verju og tveimum ótrúliga góðum málverjum, at tær hava vunnið dystirnar.

- Harumframt hava vit alt árið stríðst sera væl, og í okkara verð hevur eingin dystur verið taptur, fyrr enn dómararnir hava bríkslað fyri seinastu ferð, sigur liðskiparin, sum eisini nevnir góða samanhaldið í hópinum.

Ioana skudi mansverjast

Um dystin leygardagin sigur hon, at tær høvdu gjørt av, at Ioana Rápa skuldi mansverjast allan dystin, fyri at vita um hetta kanska kundi steðga henni. Iona var tó als ikki á vøllinum hendan dagin, og um tað hevði nakra ávirkan, veit Inga ikki at siga, men hon heldur ikki, at spælið var nakað serligt fyrsta hálva tíman.

- Í hálvleikinum fingu vit so ein ordiligan uppsang, og í seinna hálvleiki fingu glið á okkara spæl, har verjan riggaði, og vit fáa nøkur mál upp á kontra, segði Inga at enda, áðrenn hon saman við liðfeløgunum gjørdi seg til at stuðla monnunum í felagnum.



Inga Danberg heldur, at tað fyrst og fremst er ein sterk verja og ein góður stríðsvilji, sum hevur tryggjað Neistakvinnunum silvurmerkinin

Endaðu við sigri

Neistin vann seinasta dystin á árinum, tá tær í Vestmanna leiktu upphitingardyst til gullbrakið hjá monnunum, og staðfestu sostatt støðuna sum silvurvinnarar

Jákup Mørk

VÍF-Neistin 12-20 (8-9)

Orsakað av stóra spenninginum undan sokallaða final-udystinum, var høllin meira ella minni fullsett, tá kvinnurnar hjá VÍF og Neistanum skuldu royna seg leygardagin.

Vestmenningar hava altíð verið trúfastir stuðlar hjá liðum sínum, og tað var sjónligt, at flestu áskoðararnir vóru møtt tíðliga, soleiðis at tað skuldi bera til at fáa sær ein góðan sess.

Neistaviðhaldsfólkini vóru eisini nógv í tali. Bussar vóru farnir úr Havnin við áskoðarum, so ytru karmarnir fyri einum undirhaldandi dysti vóru so avgjørt í lagi.

Rápa ikki við

Tað var tó skjótt greitt, at fyritreytirnar hjá VÍF fyri einum sigri, vóru alt annað enn optimalar, tí Ioana Rápa, sum hevur drigist við skaða stóran part av árinum, var ikki á vøllinum til hendan dystin.

Fleiri feðrir hevur hon annars spælt, hóast hon kanska heldur átti at bundið frið, men týdningurin av dystinum hesuferð, var helst ikki nóg stórur, til at hon vildi seta heilsuna í vága.

Liðfelagar hennara megnaðu tó at geva neistakvinnunum harða mótstøðu fyrsta hálva tíman. Munurin á liðunum var ongantíð serliga stórur, men meginpartin av tíðini var tað tó Neistin, sum átti eina lítla yvirvág.

Hamskiftar

Hvat Christian Poulsen hevur sagt sínum leikarum í hávleikinum veit eg ikki, men í øllum førum vóru neistakvinnurnar sum hamskiftar, tá tær komu á vøllin til seinna hálvleik.

Verjan var nú nógv grammari enn hon hevði verið fyrra hálvleikin, og tað var serliga í hesum partinum av spælinum, at tryggi sigurin varð grundlagdur.

Vælskipaða verjuspælið hevði eisini við sær, at tað í fleiri førum eydnaðist neistakvinnunum at seta skjót mótálop í gongd, og sum dysturin leið, gjørdist sigurin alsamt meira vísur.

Tað var eisini líkt til, at havnargenturnar vóru nógv betri fyri kropsliga enn vertirnir. Tær høvdu tískil neyðuga yvirskotið til at skifta leikferðina, umframt at hetta sum fráleið eisini gav teimum eina sálarliga yvirvág.

At VÍF bert megnaði at skjóta fýra mál allan seinna hálvleik boðar greitt frá, at verjuparturin hjá Neistanum var í lagi, og tað er einki at taka seg aftur í, at júst hetta hevur verið styrkin hjá liðnum hetta kappingarárið.

Kanska sær tað ikki altíð so øgiliga vakurt út, men stigini eru við javnari ferð komin inn kontina, og nú kappingarárið er lokið, hava neistakvinnurnar fingið silvurmerkini um hálsin.

Kann gerast trupult

Frøin var tí sjálvandi stór á gentunum, tá tær eftir dystin fingu merkini um hálsin, meðan støðan helst var nakað øðrvísi hjá VÍF.

Tær høvdu eisini góðar orsøkir til at kenna seg eitt sindur vónsviknar, nú tær eingi heiðursmerki fingu. So at siga alt kappingarárið hava tær verið við til at mynda toppin, og leingi var eisini líkt til, at tað skuldi eydnast teimum at fáa silvurmerkini.

Seinastu dystirnar í árinum hevur úrtøkan tó verið ov lítil, og eru bæði Kyndil og Neistin farin fram við vestmannakvinnunum.

Liðið eigur tó aftur í ár toppskjúttan í føroyski kappingini, tí á hesum plássi hevur Iana Rápa so at siga alt árið verið ovast. Størsti spurningurin man tí vera, hvussu verður við VÍF, um rumenski venjarin ikki er á liðnum komandi kappingarár.

Uttan at niðurgera nakran av hinum leikarunum kann staðfestast, at hon er so nógv tann týdningarmesti leikarin á liðnum, og uttan hana ber illa til at ímynda sær, at VÍF fer at gera nakað serligt um seg komandi árini.

Frágongd er eisini nakað, sum neistafólkini mugu hugsa um komandi mánaðirnar. Fleiri av ungu leikarunum verða lidnar við miðnámsútbúgving sína í summar, og so er spurningurin helst, um nøkur teirra fer av landinum at útbúgva seg.

Eisini tykist óvist, um Ileana Manolescu verður við aftur komandi ár, so í ringasta føri kann støðan gerast soleiðis, at Neistin komandi ár verður í somu støðu, sum tær vóru í fyrsta partin av kappingini hetta árið.

Fyrstu dystirnar gekst teimum nevnliga sera striltið at fáa nakað stig burtur úr dystunum, men so við og við er liðið komið fyri seg, og tá avtornaði endaðu tær altso á næst ovasta sessinum.

Dysturin í tølum
Málskjúttar:
VÍF: Jacklin Durhuus 4, Fríða Marjunardóttir 3 (1), Óluvá Poulsen 2, Randi Kúrberg 2, Signhild Petersen 1
Neistin: Marjun Jógvansdóttir 4 (2), Katrin á Neystabø 3, Inga Danberg 3, Mildrid Jacobsen 3, Ileana Manolescu 2, Gunnleyg Berg 2, Birita Wardum 2, Bjørg Patursson 1 (1)
Brotskøst:
VÍF 1, Neistin 4
Útvísingar:
VÍF 2, Neistin 1
Dómarar úr KÍF:
Vagnur Johansen og Jónolvur Johannesen



Mildrid Jacobsen og liðfelagarnir úr Neistanum vunnu eisini seinasta dystin hetta kappingarárið, og staðfestu sostatt silvurplássið, sum tær vunnu sær fyri einari viku síðani

Mynd: Álvur Haraldsen

Enda við galla-kvøldi

Bæði vaksin og børn hava í ár møguleika at runda hondbóltsárið av við stórum gallakvøldi

Jákup Mørk

Eftir at seinastu landskappingardystirnir á hesum sinni vórðu leiktir leygardagin, fingu allir fyrstudeildar leikarar hjá ymsu feløgunum tillutað atkvøðuseðlar, har leikararnir skuldu gera av, hvønn tey hildu vera bestu leikararnar í kappingini.

Ætlanin við hesum er, at ársins leikarar á ymsum plássum skulu kjósast, og verður avdúkingin av hesum á stórum gallakvøldi, sum verður í høllini á Læraraskúlanum komandi vikuskifti.

Líknandi tiltak var eisini hildið fyri einum ári síðani, og fyrireikararnir úr H71 vóna, at undirtøkan í ár verður eins góð og hon var fyri einum ári síðani, tá leikarar úr nærum øllum feløgum gjørdu sítt til at hava eina hugnaliga løtu, har tosað var um alt tað, sum fyrifórst í farna kappingarárinum.

Eisini børnini

Tað eru tó ikki bara tey vaksnu, sum á henda hátt hava høvi at takka fyri seg. Sum nakað nýtt hevur Neistin tikið stig til at skipa fyri gallakvøldi fyri yngru leikararnar.

Elinborg, sum er limur í foreldrabóllkinum hjá Neistanum, sigur frá, at tey í ár ætla at geva yngru leikarunum høvið til at hittast, nú kappingarárið hjá teimum er lokið.

Ætlanin við hesum er fyrst og fremst, at leikararnir skulu fáa høvið at læra hvønn annan betur at kenna. Vanliga hittast børnini bert, tá dystur er á skránni, og aloftast er tá neyðugt at seta beina kós móti heimstaðnum, so skjótt dysturin er lokin.

Skráin fyri tiltakið er longu løgd, og børnini kunnu uttan iva vænta eina bæði stuttliga og spennandi løtu. Til matna verður smyrjibreyð og sodavatn, og undir borðhaldinum verður tað Johan í Kollafirði, sum kemur at standa fyri undirhaldinum.

Seinni skulu luttakararnir ætlandi hyggja at videoupptøkum, sum sýna ymisk kiks, sum eru farin fram á hondbóltsvøllum, og dansur verður sjálvandi eisini á skránni.

Vælumtókti tónleikabólkurin, Tangz, fer at spæla á tiltakinum, og eisini verður Krit at hoyra. Krit er ein nýstovnaður bólkur, sum er settur saman av næmingum úr Kommunuskúlanum í Havn.

Atgongumerki

Ætlandi skal tiltakið vara í einar tríggjar tímar, og er tíðarætlanin løgd soleiðis, at øll børnini hava møguleika at koma aftur og fram sama dag.

Leygardagurin, 15. apríl, er ásettur at verða dagurin, tá tiltakið ferð av barkastokki, og verður klokkan 15.00.

Sølan av atgongumerkjum er byrjað, og er seinasta freist fyri hesum mikudagin, tá fólk vera í neistahølinum, har atgongumerkini verða seld. Kostnaðurin er 70 krónur fyri hvønn leikara, men tó sleppa systkin við á veistluna fyri 100 kr.

Eingin forðing er fyri, at leikarar eisini hava vinfólk við sær, og við hesum vónar foreldrabóllkurin, at eisini børn, sum ikki spæla hondbólt, fáa hug at koma við á veitsluna.



Líkt er til, at galla-kvøld fyri hondbóltsleikarum verður eitt afturvendandi tiltak, og nú skipar Neistin eisini fyri einum kvøldi fyri børnini